Brimil gjørdist ein d‡r skomm

Ta› kosta›i Føroya Sjómansskúla eina knappa hálva millión at senda næmingar til Danmarkar at sigla, tí Brimil ikki slapp at loysa. Ta› er meira, enn yvirmenninir krevja í lønarhækkan í eitt heilt ár. Ein vanærilig skomm, siga fakfelags-formenninir

Eykajáttanin til Sjómansskúlan var› d‡rari enn krøvini um lønarhækking til yvirmenninar á Brimli høvdu kosta› í eitt heilt ár

BRIMIL
Edvard Joensen

At Sjómansskúlin noyddist at senda næmingarnar til Danmarkar at sigla í heyst kosta›i meira, enn kravi› um lønarhækkan til yvirmenninar á Brimli kostar í eitt heilt ár.

Føroya Sjómansskúli noyddist at bi›a Fíggjarnevndina um eina eykajáttan upp á 471.000,- krónur fyri at næmingarnir skuldu fá kravdu siglingina í samband vi› undirvísingina, sigur Dánjal Johan Poulsen, stjóri á Føroya Sjómansskúla.

Hetta komst av, at Sjómansskúlin hev›i rokna› vi›, at næmingarnir skuldu vi› Brimli. Men hann liggur svínabundin í Noreg, og tí var› ney›ugt at leiga skip, sum lá í Esbjerg, og senda allar næmingarnar til Danmarkar.

Um semja hev›i veri› fingin millum fakfeløgini og Fíggjarmálast‡ri›, hev›i hesin trupulleikin ikki veri›, og tann hálva milliónin hev›i veri› spard.

Brimil er útgjørdur vi› skúlastovu vi› øllum tí, sum til slíka undirvísing hoyrir, júst fyri at sjómansskúlanæmingarnir skulu kunna brúka skipi› í undirvísingini. Har er øll nautisk útger›, sum krevst og finst, og ta› kostar heldur ikki einki.

Dánjal Johan Poulsen ásannar, at ta› var ein strika í rokningini hjá skúlanum bæ›i so og so, at Brimil ikki kom. Ikki bara hendan eykajátanin, men eisini ta›, at siglingin fall nógv seinni enn ætla› og tí kom í so nær próvtøkuni. Hann leggur tó dent á, at seinkingin ikki hevur ávirka› próvtøkuna kortini.

D‡rari enn yvirmenninir

Men vi› tí er ikki øll søgan søgd.

Grundin til, at Brimil liggur, er jú tann, at Fíggjarmálast‡ri› og fakfeløgini, sum vara av manningini á skipinum, ikki kunnu semjast um lønarkrøvini.

Feløgini hava sett síni krøv, sum myndugleikarnir vísa aftur vi› teirri grundgeving, at tey kosta ov nógv. Samstundis ver›ur latin eykajáttan til sjómansskúlanæmingar, sum koma í ney› av júst hesi fastlæstu stø›uni, sum er í minsta lagi› 26.000,- krónur hægri, enn krøvini um lønarhækkan til yvirmenninar eru í eitt heilt ár. Og tá ver›ur rokna› vi› endaløn til allar navigatørarnar. Bæ›i skipara og st‡rimenn. Hetta tí, at ikki bar til, á›renn bla›i› fór til prentingar, at fáa nágreiniligu innplaseringarnar hjá yvirmonnunum.

Sambært uppl‡singum frá Fíggjarmálast‡rinum, krevja navigatørar og maskinmenn eina lønarhækkan, sum á endaløn vi› pensión fer at kosta 445.000,- krónur árliga. Ta› eru 26.000,- krónur minni enn Sjómansskúlin fekk í eykajáttan.

Í hesi upphæd er, sum sagt ikki tikin hædd fyri persónligum innplaseringum hjá teimum einstøku yvirmonnunum, men bert rokna› vi› hægstu endaløn. Ta› vil siga, at munurin ivaleyst er størri.
Hinvegin skal so eisini sigast, at eisini dekkararnir hava sett síni lønarkrøv, sum ikki hevur bori› til at fingi› uppl‡st enn. Til tess eru tær samrá›ingarnar komnar ov stutt, sigur Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum, sum umbo›ar dekkarar og kokkar.

Skomm

Bæ›i Ellintur Abrahamsen, forma›ur í Skipara- og Navigatørfelagnum, og Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum, siga, at føroyskir myndugleikar hava gjørt sær so vanæriliga fyri skommum uttanlands av hesum málinum.

Men ta›, sum teir eru eina mest argir um, er at landsst‡risma›urin arbei›ir vi› einihvørjari ætlan um at loysa alt máli› vi› at gera alla manningina til tænastumenn.

Ta› minnir ein heilan hóp um tann sk‡maskotspolitikk, landsst‡risma›urin vi› fíggjarmálum rak beint eftir seinasta starvsmannaverkfalli›, sigur Gunnleivur Dalsgar›, forma›ur í Starvsmannafelagnum.

Og hann er púra samdur vi› Ellinti Abrahamsen, tá hesin sigur, at ta› skal koma at standa rættiliga nógv á, á›renn ta› ver›ur loysnin, bara at smoyggja eitt tænastumannheiti yvir manningarnar.

Gunnleivur Dalsgar› sigur, at alt hetta máli› vísir bara, hvussu líti› skil fyrisitingin hevur fyri tí, hesir menninir gera. Ta› eru sanniliga ikki stuttleikatúrar, eitt bjargingarskip ger. Hann vísir í hesum sambandi á ta›, sum júst hendi í Nor›sjónum, har danskt bjargingarskip misti ein mann, tá teir í ódnarve›ri bjarga›u eini t‡skari skipsmanning.

Og hann fer at halla til ta ásko›an, sigur forma›urin í Starvsmannafelagnum, sum ein ma›ur, hann tosa›i vi› um dagarnar, hev›i.

Hesin ma›urin seg›i bart út, at Føroyar - bæ›i politiskt og fyrisitingarliga - ver›a st‡rdar av einum flokki av gla›um amatørum.

Karsten Hansen, landsst‡risma›ur vi› fíggjarmálum, var ikki at hitta, á›renn bla›i› fór til prentingar.

Ternan royndartúr

Arbei›i› vi› at skifta maskinurnar í Ternuni er komi› so miki› álei›is, at sett ver›ur í gongd í dag

SAMFER‹SLA

Gongur alt væl, kann Ternan vera aftur í sigling kanska einafer› í næstu viku.

Arbei›i› vi› at skifta maskinurnar er li›ugt, og sett ver›ur í gongd í dag. Tá er bæ›i ísetan av maskinum, el-installatiónir og hvat nú er at gera li›ugt.
Spennandi ver›ur so at vita, hvussu ta› fer at roynast, sigur Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandfaraskipum Landsins. Ta› kann altí› okkurt smávegis vera at rætta uppá. Men tekniski stjórin væntar, at ta› ganga bara nakrir heilt fáir dagar, til Ternan er aftur í regluligari sigling.

ej

– Eg fekk nógvar gó›ar afturmeldingar og nógv gó› hugskot til at arbei›a ví›ari vi›, seg›i Malan Marnersdóttir, tá hon vardi doktararitger›ina fríggjadagin

Malan Marnersdóttir vart doktararitger›

Fitt av fólki, harímillum fleiri føroysk lesandi, høvdu leita› sær inn í eitt n‡bygt auditorium á lærda háskúlanum í Århus fríggjadagin, tá bókmentafrø›ingurin og rektarin á Fró›skaparsetrinum Malan Marnersdóttir vardi føroysku doktararitger› sína

DOKTARARITGER‹
Rúnar Reistrup

Århus: – Hatta var ein fruktagó› verja fyri mítt vi›komandi. Eg fekk nógvar gó›ar afturmeldingar og nógv gó› hugskot til at arbei›a ví›ari vi›.

Solei›is seg›i Malan Marnersdóttir, bókmentafrø›ingur, eftir at hava siti› meira enn f‡ra tímar í brennideplinum og vart doktararitger› sína á lærda háskúlanum í Århus fríggjadagin.

Ritger›in, sum Føroya Fró›skaparfelag gav út sum bók 20. oktober í ár undir heitinum "Hvør av ø›rum - samanseting, frásøgn og millumtekstleiki í føroyskari skaldsøgu eftir 1970" er úrslit av átta ára langum arbei›i hjá n‡klækta doktaranum.

– Fyrireikingararbei›i› byrja›i tá eg í 1992 fekk stu›ul frá Humanistisk Forskningsfond. Tá fer›aist eg í nakrar mána›ir í millum anna› í Danmarkar og Noregi, har eg gjørdi uppsøkjandi arbei›i og var til fyrilestrar, me›an eg so lí›andi fann fram til, hvat eg skuldi leggja dent á í komandi ritger›ini.

Spríkir úr 8 skaldsøgum

Doktararitger›in hjá Maluni Marnersdóttir tekur útgangsstø›i í átta føroyskum skaldsøgum, i› hava ta› til felags, at tær eru skriva›ar eftir 1970. Í ritger›ini ver›a gongdin og frásagnarvi›urskiftini greina›, og harumframt ver›ur hugt at tí, sum kalla› ver›ur millumtekstleiki í teimum átta skaldsøgunum. Hetta seinasta er ein kanning av, hvussu søgur og temu ganga aftur og so at siga "arvast" frá einum bókmentaverki til eitt anna›

Malan valdi at skriva doktararitger›ina á føroyskum, hóast ta› ikki vóru føroyingar, i› skuldu meta hana. Hetta er bert a›ru fer› at ein doktararitger› er skriva› á føroyskum máli.

– Men eg havi ikki hoyrt naka› um at ta› hevur elvt til trupulleikar, at eg skriva›i ritger›ina á føroyskum. Fólk í eru køn í norrønum duga eisini at lesa føroyskt, sigur Malan Marnersdóttir.
Opponenternir vi› doktaraverjuna vóru Idar Stegane professari vi› lærda háskúlan í Bergen og Rolf Reitan lektari vi› lærda háskúlan í Århus, og teir var Malan Marnersdóttir væl nøgd vi›.

– Í einum so umfatandi verki sum einari doktararitger›, so eru ta› altí› okkurt, sum man er farin léttari um enn man kanska burdi, men hinvegin ber ta› jú ikki til at ganga allar vegir ísenn. Teir høvdu fleiri gó›ar vi›merkingar um hvussu hetta og hatta kundi veri› gjørt ø›rvísi, og eg haldi meg hava fingi› nógv burturúr, seg›i Malan Marnersdóttir eftir at hava vart ritger›ina.

Hvat nú

Eftir at sjálv ritger›in bleiv li›ug fyrr í ár, hevur bókmentafrø›ingurin brúkt tí›ina til at fyrireika seg til at verja hana. Fyrireikingin hevur millum anna› veri› at kaga enn einafer› í tær átta skaldsøgurnar og uppfríska teoretiska kunnleikan. Fríggjadagin klokkan hálvgum seks var so alt knappliga li›ugt.

– Ta› kennist løgi›, men tann stóra reaktiónin er ikki komin enn haldi eg. Hon kemur helst ikki fyrr enn eg fari til Føroya aftur, seg›i Malan Marnersdóttir, sum valdi at vera verandi í hus í nakrar dagar og taka sær av løttum eftir at hava vart ritger›ina.

– Eg havi hoyrt at tann kenslan sum man fær tá arbei›i› nú knappliga er li›ugt kann samanberast vi› at detta ni›ur í eitt stórt svart hol, so nú fáa vit at síggja um ta› eisini fer at henda fyri meg.

Rektarin á Fró›skaparsetri Føroya fer tó ikki heim til ein tóman kalendara, tí hon hevur longu a›rar verkætlanir í gongd. Millum anna› arbei›ir hon saman vi› ø›rum fram ímóti at gera eina samla›a føroyska bókmentasøgu.

Jólasølustevnan 2000

í ítróttarhøllini á Kambsdali 09.-10. desember

SKRÁ:

Leygardagin 09. des.

Kl. 14.00 Jólasølustevnan letur upp
Kl. 15.00 Stevnan verður sett
Kl. 16.00 Mótaframsýning
Kl. 17.30 klovnar
Kl. 19.00 Óli og Juul spæla harmoniku
Kl. 20.00 Mótaframsýning
Kl. 21.00 Niels, Petur Jacob og Hans Jacob undirhalda
Kl. 22.00 Sølustevnan letur aftur

Sunnudagin 10. des.

Kl. 15.00 Jólasølustevnan letur upp
Kl. 16.00 Mótaframsýning
Kl. 17.00 Vísusangur úr Klaksvík
Kl. 18.00 Trøllapætur
Kl. 20.00 Mótaframsýning
Kl. 21.00 Blandaða kórið úr Fuglafirði syngur
Kl. 22.00 Lutaseðlarnir verða drignir og sølustevnan endar

Skipað verður fyri barnaansing